# John Purcell og Ivory Kári Sverrisson

*Konsert í losjuni í Gøtu*

Vit kunna siga um tað, at blíva uppdagaður av tí seriøsa og almannagóðkenda tónleikaheiminum, er sjáldsamt. Og hetta má sigast um Ivory.

Bólkurin er eftir hondini vorðin kendur av føroyingum, og nú ikki bara av føroyingum. John Purcell, ið livir og arbeiðir fyri tónleiki og tónleikarum, er fallin fyri hesum bólki. Kend nøvn sum Stevie Wonder, Paul Simon, Sammy Davis Jnr. er millum tey, ið hava virkað saman við John Purcell.

Hesin tónameistarin kennir tað sum sína ábyrgd at føra hendan bólkin víðari í tónleikaheiminum. Ivory hevur óivað eina serliga spennandi og lovandi framtíð fyri sær.

Konsertin leygarkvøldið í Gøtu var merkt av vakrum og bergtakandi sangi; improvisatión, ungum evnaríkum tónleikarum við einum gevandi tóna -og lærumeistara.

Konsertin, sum var skipað av tónleikafelagnum Grót, var í tveimum pørtum við stegði í millum. Fyrst spældu Ivory, uttan John Purcell, nøkur løg; síðan sang og spældi Kári Sverrisson. Og í seinna parti spældu so Ivory saman við John Purcell. Hesin seinni parturin bleiv í so langur fyri summum av áhoyrarunum, sum valdu at sleppa sær.



### Kári Sverrisson; Gabriels tunga.

Tann, ið dróg tað mestu andaktina frá lurtarunum, var Kári Sverrisson. Øll í Losjuni í Gøtu hetta kvøldið, vóru upptikin av sangi Kári Sverrissonar.

Mannligir sangarar verða sjálvdan líknaðir við einglar, men í hesum førinum er nokk vert at tríva í eina tílíka samanbering. Kári Sverrisson, við Enekk, heldur seg tætt at teimum føroysku og norðurlendsku tónarøtunum. Kvæði og skjaldur eru tikin fram aftur, og við eitt sinduri av nýbrotnum tónleiki er lív komið í aftur hesar dýrgripir.

Føroyskir tónleikarar, serliga ungir, hava ofta trupult við syngja á móðirmálinum; hetta kann hava keðiligar fylgjur, sangir missa ofta samleika og sýnast ópersónligir, doyvast; vit tosa jú, og eisini hugsa, á føroyskum.

Sangir úr teimum trimum útgávunum frá Enekk vórðu framførdir; »Andlits hins tigandi«, »Ver sterk mín sál« og »Fýra nætur fyri jól«. Tá Kári var liðugur, varð óført klappað, áhoyrararnir vildu hoyra eitt lag afturat. »Sorg«, yrking eftir Janus Djurhuus av »Ver sterk mín sál« bleiv til tað síðsta lagið.

### Ivory við Purcell

Eftir steðg við køkum, kaffi og práti, vóru Ivory og John Purcell klár.

Purcell spælir á saxellu; sum annars er ein sjáldsom saxofon, ið kann spæla heilt høgar tónar og eisini heilt lágar. Hesir møguleikarnar við saxelloini hóskaðu væl í samanspælinum við røddina hjá Eivør og eisini guitarspælinum hjá Búa D. Jacobsen. Samanspælið millum rødd og saxello vóru ofta við sera høgum tónum. Saxelloin var dominerandi á tann hátt, at hon avgjørdi huglagið og trýsti ella royndi at útfordra teir ungu tónleikararnar til spæla sítt allarbesta.

Ivory spældi betri, tá Purcell var við í leikinum; eitt skarpari bit var í. Purcell virkaði sum ein lærumeistari ella vegleiðari í tónasamansetingunum. Sum sagt, varð nógvur av tónleikinum improviseraður, og bólkurin hevði ikki vant nakað serliga nógv frammanundan, hetta hoyrdist av og á; t.d. virkaði tað annars so frálíka lagið »Gaya« eitt sindur dovið. Annars koyrdu løgini væl, Mikal Blak spældi einastandi. Og Brandur Jacobsen ráhyggaði sær aftanfyri trummurnar.

Tað er serliga á trummuspælinum at tað hoyrist munur á, tá Purcell spælir við. Brandur ger meiri av tá og er nógv meiri skapandi. Aaron Bilyeu er trummuspælari úr USA og er í ferðalagi við John Purcell. Hann spældi eisini trummur til teir síðstu sangirnar, so tvey trummusett vóru brúkt samstundis. Rútmurnar bóru dám av norðuramerikanskum indiánar/eskimo mentan. Hetta riggaði óføra væl. Tað síðsta lagið, tað, sum tey í Ivory kenna sum »Star«, var ein fragd fyri oyra.

### Høgt flog

Tónleikurin var høgtflúgvandi, improviserandi og leitandi, tónlist er kanska orðið at brúka. Sum áhoyrari, hevði man løtur har trupult var at fylgja við. Jazz/etno/folk varð upplýst um tónasjangruna hetta kvøldið. Og John Purcell kom heldur ikki við tónleiki frá Michael Jackson ella Paul Simon, als ikki. Alternativur etno/jazz musikkur er kanska eitt heitið, men orð strekkja ikki til.

Purcell tekur tónleikin upp á eitt hægri støði, enn vanligt er; sum íblástur og ávirkan nevnir Purcell m.a. heimsspekis -og átrúnaðarligar miðdeplar sum Tibet, Jerusalem og eisini Norðuramerika við upprunafólkinum, har hann sjálvur er ættaður.

Hann hevur m.a. arbeitt sum »sound consultant«, ein instrument -og ljóðvegleiðari, fyri eina røð av heimskendum saxofonistum t.d. Michael Brekcer, sum fyri stuttum hevur arbeitt við tí heimskenda tónleikaranum Sting. So, hann veit hvussu mann spælir saxofon, sum hann tók til »eg kenni meg sum eitt við instrumentið«.

John Purcell tosar sera kensluborið um hendan bólkin, sum hann er góður við og vil framyvir geva av síni stóra lærdómi og vitan. Ivory hevur longu fingið nógv frá Purcell, tónleikurin er á einum høgum støði, serliga tá hugsa verður um so ungar tónleikarar.







# Jehova Vitni broyta mannagongd í spurninginum um blóðmóttøku

*Jehova Vitni kunnu nú taka móti blóði, uttan beinleiðis at vera stoytt úr trúarbólkinum. Eygleiðarar meta, broytingin er gjørd til tess at sleppa undan sakarmálum. Talsmaðurin fyri Jehova í Føroyum Otniel Nygaard sigur, at talan er um alternativar møguleikar*



NICLAS JOHANNESEN

Tað skapti ikki sørt av røringi, tá enska blaðið The Times of London herfyri skrivaði, at trúarbólkurin Jehova Vitni hevði snarað 360 stig í spurninginum um blóðflutning. Eisini í USA og Kanada hava tíðindini givið eftirljóð.

Higartil hevur tað verið bannað limum í Jehova Vitni at taka ímóti blóði. Nýggja avgerðin - sum var samtykt av leiðarunum í Jehova á eini privatari samkomu í New York í apríl mánaði - leggur dent á, at limir, sum taka ímóti blóði, verða ikki longur beinleiðis koyrdir úr Jehova Vitnum.

### Tillaging

Oddamenn í Jehova Vitnum í Norðuramerika avsannað upp á tað harðasta, at trúarbólkurin er farin frá læruni, sum forbjóðar limunum at taka ímóti blóði. Talsmenn fyri Jehova hava sagt í viðmerking, at talan er bert um smærri rættingar og tillagingar, hvussu farast skal fram, um limir í trúarbólkinum taka ímóti blóði.

Í staðin fyri at verða beinleiðis stoytt úr Jehova, verður nú sagt, at limir - ið taka móti blóði - av egnum fríum vilja eru gingnir frá læruni, sum Jehova Vitni praktisera.

Kanadiski talsmaðurin fyri Jehova, Dennis Charland, leggur dent á, at bíbliunnar Guð, sum vitnini kalla 'Jehova' beinleiðis gevur teimum boð um, at tey skulu »halda seg frá blóði« (Ápostlasøgan 15:20). Og sektin fyri hesa synd er at missa atgongd til andaliga paradísið.

James Pellechia, ein talsmaður fyri Jehova-ritið 'Watch Tower' sigur úr New York, at enska blaðið The Times of London roynir at skaða Jehova við sínari skriving.

– Blaðið skrivar, at vit eru snarað 360 stig í spurninginum um blóðflutning. Vit hava ikki snarað eitt einasta stig. Talan er hinvegin um eina minni broyting í mannagongd, sigur Pellechia.

### Sleppa undan sak

Ein kanadiskur fólkalívsfrøðingur á Lærda Háskúlanum í Victoria, sum hevur skrivað bók um Jehova Vitni, sigur, at hon trýr, at leiðararnir í trúarbólkinum hava gjørt broytingarnar fyri at gera tað lættari at sleppa undan burturstoyttum limum, sum leggja sak móti trúarbólkinum.

Her er ikki talan um broytta trúarlæru. Mín meting er, at henda broyting er gjørd fyri at sleppa undan at vera saksøktir, sigur fyrrverandi Jehova limurin Heather Botting - ið hevur skrivað bókina »The Orwellian World of the Jehovah's Witnesses«.

– Jehova hava havt stórar trupulleikar víð sakarmálum, sum er løgd móti teimum seinastu 25 árini. Nú royna Jehova at fáa tað at síggja út, sum um tað er tín egni feilur, um tú tekur teg úr trúarsektini. Hetta ger tað nógv verri hjá tí einstaka liminum at grundgeva mótvegis Jehova Vitnum í rættinum, leggur hon aftrat.

Hesum vísir James Pellechia aftur og sigur, at talan er um eina 'teologiska avgerð'. Hann ásannar kortini, at avgerðin eisini kann hava løgfrøðiligar avleiðingar, men leggur aftrat, at hann hevði onga hóming av, hvørjar tær kundu vera, positivar ella negativar - alt eftir hvørjum stati, provinsi ella landi talan er um.

Heather Botting metir, at nýggja orðingin merkir, at ein limur í Jehova Vitni, sum velur at taka móti blóði, og ikki angrar hetta, sjálvi hava valt at kvetta sambandið við Jehova Vitni.

Úrslitið er, at tey fáa ikki loyvi at tala á møtum hjá Jehova Vitnum, og tey verða ikki longur mett at vera Jehova Vitni.

– Hetta er í roynd og veru tað sama sum hendir, tá ein limur verður stoyttur úr trúarbólkinum. Úrslitið er tað sama: Tey verða ikki longur fatað sum Jehova Vitni.

Heather Botting vísir á, at farnu 20 árini eru fleiri Jehova Vitni og eisini teirra børn deyð, tí tey vildu ikki taka móti blóði. Fyrrverandi limir hava eisini ført fram í rættinum í Kanada, at tá tey blivu koyrd úr Jehova, so førdi hetta við sær, at tey eisini blivu útsoytt av teirra familju samstundis sum tey mistu teirra lívsbreyð og atgongd til andaliga paradísið.

### Eisini í Føroyum

Talsamaðurin fyri Jehova Vitnum í Føroyum Otniel Nygaard er kunnugur um nýggju kósina, men leggur líka sum hansara trúarbrøður úti í heimi dent á, at boðini í Apostlasøguni ikki at taka ímóti blóði framvegis eru galdandi fyri allar limir í Jehova Vitnum. Hinvegin vísir hann til, at læknavísundin í dag er komin við nøkrum evnum og alternativum til blóð, har tað er upp til hvønn einstakan at avgera, um tey vilja taka móti tí.

– Læknavísundin í dag kemur fram til ymiskar loysnir, sum bíblian onki sigur um, og í slíkum førum lata vit tað vera upp til samvitskuna hjá tí einstaka at avgera, um tey vilja taka ímóti, men okkara støða mótvegis at taka beinleiðis móti blóði, sum bíblian ávarar ímóti, er tann sama sum altíð, sigur Otniel Nygaard.

Otniel metir eisini, at prátið um blóðflutning ofta hevur hug at drukna í sensationalismu. Hann sigur, at hóast talan kann vera um grovar syndir og siðloysi, so vera limir ikki útstoyttir automatiskt. Talan kann vera um drúgva gongd, har serlig atlit eisini vera víst til, um viðkomandi angrar ella ikki. Tað er ikki so svart-hvít, sum tað ofta verður gjørt til í fjølmiðlum, sigur Otniel.

Upp á spurningin um, hví fleiri fyrrverandi limir vísa á, at broytta mannagongdin helst er gjørd til tess at sleppa undan at tapa sakarmál, sum fyrrverandi limir leggja móti Jehova, sigur føroyski talsmaðurin fyri Vitnini:

– Tað vísir seg, at fyrrverandi limir ofta eru serstakliga ágangandi mótvegis Jehova Vitnum, og ofta er torført hjá okkum at kenna tað aftur, sum tey føra fram.